# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Blikk Café í Saltangará



*Eigararnir av Blikk Café í Saltangará f.v.: Brynjolvur Nielsen, Christian Høgni Jacobsen, Tummas Petur Thomassen og Kári Streymoy*

**KAFÉ**

Mánadagin 15. januar læt ein nýggj kafé upp í Saltangará. Talan er um Blikk Café. Í hesum sambandi var almenn móttøka í nýinnrættaðum hølum sunnudagin 14. januar, har nógv fólk nýttu høvi at støkka inn á gólvið.

Tað eru Christian Høgni Jacobsen, Brynjolvur Nielsen, Tummas Petur Thomassen og Kári Streymoy sum eiga og reka caféina, ið heldur til í tí nú umbygda og víðkaða húsinum, har blikksmiðjan hjá Bjarna Hansen og seinni eisini blómu- og gávuhandil var í mong ár. Harav navnið Blikk Café.

Nýggju eigararnir hava gjørt sjálvt húsið liðugt, men annars umbygt og bygt víðari á tað, sum var frammanundan, so hølini nú eru stór og rúmsátt, samstundis sum tey eru sera hugnalig.

Sambært eigarunum er endamálið við at hesi kaféini er at nøkta ein tørv, sum hevur verið fyri einum slíkum staði í Runavíkar kommunu.

Dagligur leiðari á Blikk Caféini er Jona Michaelsen.



*Sunnudagin var almenn móttøka í kaféini*

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum, sum gleddu meg á føðingardegnum.
Gott nýttár.

**Heilsan Essan**

**Dagurin**

**19. januar. Pontianus.** Úr Spoleto í Italia. Doyði umleið ár 160 fyri trúgv sína. Gamli Knútur hertogi er eftir julianska kalendaranum sami sum nevndur er 7. januar. Kyndilsmessuknútur sipar til gamlar danskar veðurspádómar á hesum degi. Í Føroyum varð sagt: Sum veðrið er kyndilsmessuknút skal tað vera kyndilsmessu út.

Lesið Sosialin - so eru tit við

†

## Andlát og jarðarferðir

**Niels Juul Joensen, ættaður úr Norðdepli**, búsitandi í Klaksvík, andaðist á Klaksvíkar sjúkrahúsi mikudagin 17. januar, 78 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum leygardagin kl. 17. Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni sunnudagin kl. 13.

**Helge Justinussen, bókbindari, Tórshavn**, andaðist týsdagin 16. januar, 79 ára gamal. Bønarhald verður á Landssjúkrahúskapellinum fríggjakvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni leygardagin kl. 14.

**Mikkjal Mørk, ættaður úr Tórshavn**, andaðist á Landssjúkrahúsinum týsdagin 16. januar, 60 ára gamal. Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum fríggjakvøldið kl. 20. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni leygardagin kl. 12. Tey, ið vilja minnast Mikkjal, kunna lata Herberginum eina peningagávu; konta í peningastovnunum

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum,
at kæri pápi okkara

**Helge Justinussen**

Tórshavn

andaðist á Landssjúkrahúsinum 16. januar,
79 ára gamal.

Kistan fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum
fríggjadagin kl. 18.
Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni
leygardagin kl. 14.00.

**Kári, Paula, Marjun, Jens Christian og Hilda**

†

**Aksel Kastrup**

diakon

andaðist sunnudagin 14. jan. í heiminum,
89 ára gamal.

Jarðarferðin verður leygardagin 20. jan.
kl. 12.00 úr Viby Kirke.

Aftaná eru øll hjartaliga vælkomin til ein kaffimunn
í heiminum á Enghavevej 2.

**Anna, Ruth, Sys og Thomas**